## Bestu leiðararnir tilnevndir



Tað verða Christian Nagata (Nema og Sendistovan), Johannes Jensen (Hotel Føroyar) ella Johanna á Bergi (Faroe Ship), sum verða kosin sum besti leiðarin í Føroyum í 2008. Fríggjadagin skipar Synergi fyri ársins leiðaradegi, og dómsnevndin hevur nú tikið støðu til, hvørji tey trý eru, sum skulu tilnevnast til heitið, ársins leiðari. Í dómsnevndini sita Gloria Kalsø, lærari á Føroya Handilsskúla, Óli á Deild, stjóri á Vinnuvitan, og Marita Rasmussen, sum er stjóri í Vinnuhúsinum.

## Skriva skúlabørn inn í Havn

Tórshavnar Kommuna hevur boðað frá, at innskrivingin til komandi skúlaár verður 29. og 30. januar millum klokkan 15 og 18. Her verða tey skrivað upp at sleppa í tann skúlan, sum tey ynskja ella búgva næst við. Tað kann tó henda, um tað ikki er pláss í tí skúlanum, tey helst vilja sleppa í, at tey verða flutt í annan skúla at ganga. Tá felagsinnskrivingin er liðug, fáa foreldrini boð um, hvar barn teirra fer at ganga í skúla. Eisini ber til at ringja í býráðssalin somu tíð. Børn, ið skulu í frítíðarskúla, kunnu verða innskrivað í býráðssalinum somu tíð, sum felagsinnskrivingin er.

# Jørgen vil hava stóra samgongu



*Jørgen Niclasen er ikki samdur við partamannin, Poul Michelsen, um, hvørjar samgongur eru tær bestu*

**Formaðurin í Fólkaflokkinum tekur ikki undir við partamanninum Poul Michelsen, tí í eini smalari samgongu er alt ov lætt at blokera fyri tí politiska arbeiðnum**

SAMGONGA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jørgen Niclasen vil helst hava eina so stóra samgongu, sum gjørligt

Tað sigur formaður Fólkafloksins, nú hann er farin at samráðast við Javnaðarflokkin og Sambandsflokkin um eina nýggja samgongu.

Sostatt er hann alt annað enn samdur við partamannin, Poul Michelsen, sum í Sosialinum mánadagin staðfesti, at hann vil helst hava eina smala samgongu, sum helst ikki skal telja meiri enn 17 tinglimir.

Ein slík samgonga hevur akkurát meiriluta og tolir sostatt ikki at missa ein tann einasta tinglim.

Men júst ein slík samgonga helt Poul Michelsen vera tað sterkasta, tí tað kravdi disiplin av hvørjum einasta tinglimi fyri samgonguna.

Hinvegin helt hann, at í eini størri samgongu, er tað altíð onkur, sum fer at spæla fríspæl og tað bara skapar órógv í samgonguni.

Men hesum er floksformaður hansara alt annað enn samdur í.

- Í eini stórari samgongu, ber ikki til hjá einstøkum politikarum at blokera fyri førda politikkinum.

Jørgen Niclasen sigur, at í eini 17 manna samgongu, er alt ov lætt hjá einstøkum politikarum at blokera fyri førda politikkinum og sostatt leggja samgonguna lamna.

- Tí er tað avgjørt ein fyrimunur við eini stórari samgongu, sigur Jørgen Niclasen.

# Vestmenningar valdu besta møguleikan

**Borgarstjórin í Vestmanna heldur, at vestmenningar gjørdu eitt gott val, tá ið teir á fólkaatkvøðu leygardagin avgjørdu við stórum meiriluta at samstarva við Streymoy, heldur enn við Vágar og Sundalagið**

KOMMUNUSAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Ein stórur partur av vestmenningum vil helst samstarva við Streymoynna og borgarsjórin heldur, at tað hevur avgjørt sínar fyrimunir, men tað hevur eisini sínar vansar*

- Eg haldi, at vestmenningar hava valt tann frægasta møguleikan.

Tað heldur borgarstjórin í Vestmanna, Karl A. Olsen.

Á bygdaráðsfundi í gjárkvøldið staðfesti bygdaráðið úrslitið av vegleiðandi fólkaatkvøðuni leygardagin, har vestmenningar skuldu velja, hvat kommunalt samstarvsøki, bygdin skuldi hoyra til.

Tað vóru tríggir møguleikar, antin at samstarva við Vágar, við Sundalagið, ella við Streymoynna.

Men úrslitið av fólkaatkvøðuni læt ongan iva vera um úrslitið, tí 481 fólk, ella 60,1% atkvøddu fyri at samstarva við Streymoy, 169 fólk, ella 21% atkvøddu fyri at samstarva við Vágar og 123 fólk, ella 15,4% atkvøddu fyri at samstarva við Sundalagið.

So vóru nakrar atkvøður blankar og ógyldugar.

### Hóvar borgarstjóranum væl

Sostatt hevur ein stórur meiriluti gjørt av at samstarva við Streymoy og tað hóvar borgarstjóranum væl.

- Vit hava bestu møguleikarnar í Streymoynni, serliga tá ið hugsað verður um arbeiðspláss og tænastur av ymsum slagi í høvuðsstaðnum.

- Í høvuðsstaðnum er kapasiteturin nógv størstur á nógvum økjum og møguleikarnir at finna arbeiði eru fjølbroyttari.

Talan er eisini um tað mest praktiska samstarvið, tí hetta er tann mest samanhangandi eindin. Hinvegin hevur alt sínar vansar og tað hevur samstarv við Streymoy eisini.

- Spurningurin er, um vit skuldu vera ein stórur partur í einum lítlum, kommunalum samstarvi, ella um vit skulu vera ein lítil partur í eini stórari eind.

- Í einum samstarvi við Streymoynna og serliga Havnina, kann tað vera ein spurningur um, hvørja ávirkan ein fær og tað skerst ikki burtur, at í einum størri samstarvseind, er avgerðin eitt sindur longur burturi frá borgarunum, enn hon er í eisini minni eind. Tí er hetta eisini ein spurningur um nærdemokrati, sigur Karl A. Olsen.

### Staðfestu fólksins vilja

Men hann leggur eisini dent á, at hóast talan var um eina vegleiðandi fólkaatkvøðu, var ongin ivi í bygdaráðnum á fundinum í gjár um at staðfesta fólksins vilja.

- Fólkið vil samstarva við Streymoy og tað hava vit staðfest.

Seks bygdaráðslimir vóru fyri og ein var ímóti.

Sostatt fer bygdaráðið í Vestmanna nú at skriva Innlendismálaráðnum skriv, har boðað verður frá, at Vestmanna hevur valt Streymoy at samstarva við og biðið verður um, at Innlendismálaráðið staðfestir avgerðina.

Hendan avgerðin hjá Vestmanna Kommunu, fær onga ávirkan á tey kommunalu samstørv, sum eru ímillum Vestmanna og aðrar kommunur, eitt nú við kommunur í Vágum og Sundalagnum um barnavernd, líkvogn og onnur mál og Vestmanna og Vágar eru eisini í sama øki í sambandi við Nærverkið, hóast tað onki hevur við kommunurnar at gera.

- Hendan samstarvsavtalan snýr seg bara um nýggj kommunal samstørv, skuldi tað hent, at fleiri málsøki verða løgd undir kommunurnar at umsita.

### Onki um samanlegging

Hinvegin leggur hann dent á, at í Vestmanna Bygdaráði hava tey ikki tosa um samanlegging við Streymoy yvirhøvur.

- Hetta snýr seg eina og aleina um at samstarva.

Tað einasta, sum tey í Vestmanna hava tosa um samanlegging, er at leggja saman við Kvívík, tí fólkaatkvøðan leygardagin vísti eisini, at yvir 90% av vestmenningum halda, at Kvívík og Vestmanna skulu leggja saman í eina kommunu.

- Bygdaráðið í Vestmanna fer nú at boðað Kvívíkar Bygdaráðið frá úrslitinum og at taka støðu til málið. So stendur tað til kvívíkingar sjálvar, um teir vilja hava samráðingar um at leggja saman ella ikki.

Løgtingið hevur ásett, at Vestmanna og Kvívík skulu í sama sam starvsøki og at avgerðin skal verða tikin í seinasta lagi 1. oktober í 2009.